VIÐMERKINGAR

# Leiðslan eigur at virða serkunnleika sjúkrasytranna

**Jenis av Rana**
*løgtingslimur og lækni*



Áheitan á Sjúkrahúsleiðsluna, Almanna & Heilsumálastýrið og Landsstýrismannin í Almanna & Heilsumálum í sambandi við støðuna á Landssjúkrahúsinum.

Harmuligt er aftur at vera vitni til ófrið á heilsuøkinum, eitt øki, har friður man verða millum fremstu mál fyri at røkka endamálinum- heilsu, trivnaði og trygd sjúklinganna- og teirra, ið har starvast.

Fram um alt eigur avgerð sjúkrasystranna um at siga seg úr starvi at síggjast sum eitt róp um hjálp. Leggið til merkis, at talan er ikki um starvsfólk við stuttum royndum, tvørturímóti hava vit við sjúkrasystrar at gera, sum útfrá drúgvum arbeiðsroyndum innan heilsuverkið mugu metast at vera fremstu serfrøðingar vit eiga á økinum. Tí áttu ávarðingar og umbøn teirra um batar at verða tikin ímóti við takksemi. Og ístaðin fyri drál, avísan og beinleiðis niðurgerðan, eiga tær stóra tøkk uppiborna, og í tøttum samstarvi átti hetta mál at verða loyst- stillisliga og innanhýsis.

At 18 av 23 sjúkrasystrum siga seg úr starvi, summar av teimum eftir drúgvar starvsroyndir, enntá í ringastu kreppuárum, er hagtal, ið talar tíðuligari enn orð.

At sjúkradagatal sjúkrasystranna er 32 pr. ársverk átti fyri langari tíð síðani, og uttan at sjúkrasystranar skuldu havt fyri neyðini at boða frá, at fingið leiðsluna at sett grundleggjandi kanningar í verk av arbeiðsumstøðunum.

At kr. 532.000 vórðu brúktar seinasta ár at løna tímaløntum sjúkrasystrum, er eitt hagtal við rannsakandi boðskapi um arbeiðsviðurskifti sjúkrasystranna.

Hinvegin siga hagtøl frá donskum sjúkrahúsi lítið og einki, so leingi leiðslan ikki upplýsir neyvt hvør deildin er, sammett verður við, tí neyvan megnar tú at finna deild við so tyngjandi og ymiskt samansettum sjúklingabólki, sum tann deildirnar á sjúkrahúsum okkara rúma. Til kunningar kann nevnast, at vit hava við eina deild at gera, har tungir røktarsjúklingar javnan liggja, har viðgerðin av krabbameinssjúkum er miðsavnað, har allar maga- og tarmsjúkur verða viðgjørdar og har viðgerðin av innløgdu sukursjúkusjúklingum fer frem. Harafturat kemur so viðgerð av øðrum akutt innløgdum sjúklingum.

Hagtøl, sum sammeta við støðuna fyri árum síðani, eru heldur ikki eftirfarandi, tí meðan sjúklingurin seinast í 80`unum t.d. hevði møguleika at koma seg heilt undir innleggjan, verður hesin í dag útskrivaður, so skjótt ráðiligt verður mett. Hetta førir sjálvsagt við sær, at røktartyngdin av teimum innløgdu er nógv størri nú enn tá.

Men samanumtikið átti, sum nevnt, tann veruleikin, at 18 dugnalig starvsfólk siga seg úr starvi, tí tær ikki orka meira, at verið nóg greið boð í sjálvum sær til leiðsluna um ótolandi arbeiðsviðurskifti!

Inniliga áheitan undirritaða, sum løgtingslimur og við innliti í arbeiðsøki sjúktasystranna, er at leiðslan virðir serkunnleika sjúkrasytranna, við m.a. at seta tvey starvsfólk beinanvegin og játta tey neyðugu tól, sum tørva. At hetta møguliga viðførðir krøv frá øðrum deildum er møguligt, men skuldi so verið, og eru tey krøvini eins væl grundaði, sum krøv teirra á B6, er jú laga manni at gera eina góða gerð einaferð enn. Uppgávan, at fáa til vega neyðugu fíggingina, verður politikkaranna og átti hendan ikki at verið trupul at loyst- í ríkastu tíð Føroyar vita um.

Umboðsmaðurin:

# Átalan sum hvarv!

**Óli Jacobsen**



Løgtingsins umboðsmaður hevur sum kunnugt ongar heimildir. Hann kann taka støðu til eina málsviðgerð og so at geva viðkomandi, sum hevur ábyrgdina, eina átalu, um hann ikki heldur at rætt er farið fram. Tí er tað ein avgjørd fortreyt fyri skipanina við umboðsmanni, at eitt tilmæli ella ein átala frá honum verður tikin til eftirtektar. Á henda hátt kann skapast ein siðvenja sum so við ov við skal gera almennu umsitingina verda hjá borgarum at hava álit á. Tað er júst soleiðis skipanin virkar í Danmark og øðrum londum. Danski umboðsmaðurin fortaldi á einum fundi í vár, at tað kom neyvan fyri, at hansara tilmæli ikki vóru tikin til eftirtektar, og tískil virkar skipanin har ætlan.

**Skipanin virkar fyri Jan Christiansen....**

Tí er tað sera umráðandi, hvussu tær fyrstu niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum verða móttiknar, tí hetta vil leggja støðið framyvir, og vil tískil vera avgerandi fyri virðið av stovninum.

Higartil eru komnar tvær niðurstøður við átalum. Onnur var innan kommunala økið, og hin innan almennan stovn, sum í hesum førinum var viðvíkjandi almennu fjølmiðlarnar. Her er tað serstakliga týdningarmikið, at borgarin kann vita sær, at hann veruliga kann hava álit á hesum stovnum og teirra tíðindatænastu.

Átalan á kommunala økinum hevur virkað eftir ætlan. Hon var tikin upp av fjølmiðlum. Borgmeistarin tók átaluna til eftirtektar og lovaði at taka neyðug stig at fáa átalaðu viðurskiftini í rættlag. Tískil er vón um eina betri skipan framyvir á hesum økinum, so tað kanska enntá kann sleppast undan fleiri átalum.

**...men ikki fyri Jógvan Jespersen.**

Jógvan Jespersen, útvarps- og tá settur sjónvarpsstjóri, fekk eisini eina átalu. Hann hevði avvíst eini kæru um ein ávísan tíðindaflutning, men hann hevði ikki fylgt fyrisitingarlógina um, at ein slík avvísing skal grundgevast.

Men henda átalan hevur fingið minst møguliga umrøðu, eisini av teimum stovnum sum átalan viðvíkir. Sjónvarpið hevur als ikki nevnt málið. Útvarpið hevur havt ein stuttan samandrátt av tí. Men her er gjørt minst møguligt burturúr. Málið hevur bert verið nevnt eina ferð, har nógv mál av minni týdningi kunnu verða endurtikin í tíðindasending eftir sending upp til 3 ferðir sama dag. Málið varð ikki av útvarpinum mett at hava slíkan týdning, at tað fekk eina yvirskrivt. Tískil hava tíðindi um eina átalu til útvarpsstjórin frá umboðsmanninum ikki verið mett at hava størri tíðindavirði enn dagsins toskaprísur av Toftum.

**Viðmerking frá kærara útihýst.**

Afturat hesum kann nevnast, at ein viðmerking frá kæraran, sum varð send útvarpinum aftaná nevndu tíðindi, als ikki var tikin upp, hóast gudarnir skulu vita, at tað annars ikki finst mark fyri, hvat útvarpið tekur upp av innsendum tilfari. Men ein viðmerking hjá einum borgara, sum ikki hevði fingið lógásettar sømdir frá stjóranum í úvarpinum, hevur ikki tíðindavirði. Tá er munur á umrøðuna av 50 ára føðingardegnum hjá formanninum í Pedagogfelagnum!

**Men hvat sigur Jógvan Jespersen?**

Men tann avgerandi spurningurin í hesum máli er: Hvat sigur Jógvan Jespersen? Í hesum førum er í hvussu er ikki talan um ein “kverulant”, men um hægsta myndugleika á økinum, sum er settur av sjálvum Føroya Løgtingi at hava eftirlit við m.ø, honum, sum hevur sett fingurin á hansara embætisførslu. Tí hevur tað serligan týdning at vita, um Jógvan tekur átaluna til eftirtektar. Og um hann vil taka stig til, at umrødda kæra verður avgreidd samb. galdandi lóggávu. Ella um hann vil taka stig til at fáa meira skipaði viðurskifti á hesum øki framyvir?

At fáa hesar spurningar svaraðar er avgerandi fyri, um virksemið hjá umboðsmanninum yvirhøvur skal hava nakra meining. Ikki minst tá hetta er fyrsta mál hjá almennum stovni vil reaktiónin geva eina ábending um, hvussu aðrir almennir stovnar fara at fyrihalda seg til líknandi mál.

Men Jógvan hevur valt at tiga! Hóast tað skuldi verið sera nærliggjandi hjá útvarpinum at fingið eina viðmerking frá sínum egnum stjóra til eina slíka átalu, so hevur ikki verið kvett í tvey. Og tað er heldur ikki á annan hátt komin minsta ábending um, at stjórin tekur átaluna til eftirtektar. Er tað nakað, so er tað øvugt. Tað sum ræður um er at fáa málið aftur við borðinum so friðarliga sum til ber!

**Tíðindafólk hava altíð rætt!**

Hetta er eisini í samsvar við tann holdning, sum Jógvan áður hevur víst, tá hann hevur havt høvi til tess. Útvarpið hevur sum útgangsstøði altíð rætt. Og tí mugu tey, sum hava eina aðra hugsan, hava órætt. Og hetta kann sjálvt løgtingsins umboðsmaður ikki broyta uppá. Tískil er heilt greitt, at Jógvan hevur als ikki áhuga fyri nøkrari sum helst viðgerð av tíðindtænastuna hjá útvarpinum, hóast eitt slíkt kjak skuldi verið náttúrligt í einum sokallaðum fólkaræðisligum samfelag. Og júst hetta málið er eitt gott dømi av mongum um, at ein slík viðgerð hevði verið tiltrongd.

Tað sama er galdandi fyri hinar fjølmiðlarnar, sum heldur ikki hava nevnt hetta mál. »Dimmalætting« gav átaluni til býráðið eina gjølla viðgerð og hevur tískil medvirkað til, at henda átalan kemur at virka eftir ætlan á tí økinum. Men í hesum málinum man »skeggið vera ov nær høkuni«! Hetta vísir hvussu óheftir teir »óheftu« fjølmiðlarnir eru av hvørjum øðrum!

**Serføroysk skipan.**

Hetta málið gevur einsamalt eina góða mynd av føroysku tíðindatænastuni. Og tað váttar allan tann iva, sum borgararnir kunnu hava um dygdina av teimum tíðindum, teir fáa servera dag um dag.

Málið lýsir eisini føroysku politisku/umsitingarligu skipanina. Uttan mun til um ein borgari hevur rætt ella órætt, og uttan mun til um ein lóg sigur eitt ella tað mótsatta, so verður úrslitið fullkomiliga tað sama!

Og tað sama er tískil eisini galdandi uttan mun til hvat Løgtingsins Umboðsmaður sigur.

*Dok.*

Hvussu gjøgnumførdur sensururin í útvarpinum er, fekst eitt gott dømi um tann morgunin, tá FF-blaðið var komið út og morgunsendingin greiddi frá bløðunum. Útvarpsmaðurin las upp tekstin um átaluna hjá umboðsmanninum niður til seinastu reglu, tað sum stóð við feitum:

**Átalan skal tigast í hel.**

Hetta sum var ein týðandi partur av lýsingini av málinum, var als ikki lisið upp, hóast upplestur av hesum 5 orðunum hevði tikið eini 2 sekund. Men hetta hóskandi nevniliga ikki við taktikkin hjá útvarpinum í hesum máli, nevniliga at ákæran skuldi tigast í hel!

Júst hetta sigur meira enn fleri greinir.



# Avgerðin var lóglig

**Hóast fyrsti fundurin hjá bygdaráðnum í Mikladali ikki var lýstur, soleiðis sum hann átti at vera, so vóru avgerðirnar á hesum fundi lógligar og kunnu ikki broytast av landsmyndugleikunum**

TRØLLANES-TRÆTAN
Eyðun Klakstein



*Hóast Mikladals bygdaráð tók avgerðina um at lata skúlan á Trøllanesi aftur á fyrsta fundi sínum, og hesin fundurin ikki var lýstur sum hann skuldi verið og avgerðin heldur ikki, so var avgerðin lóglig*

Anfinn Kallsberg hevur nú svarað fyrispurningi, sum Vilhelm Johannesen setti honum um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi.

Løgmaður staðfestir í sínum svari, at avgerðin um at niðurleggja skúlan á Trøllanesi var í tráð við lógina, og avgerðin kann ikki broytast av landsmyndugleikunum.

Vilhelm Johannesen, sum er tingmaður fyri Javnaðarflokkin, vildi hava at vita frá løgmanni, um eitt nývalt bygdaráð á fyrsta fundi sínum kann gera annað enn at skipa seg og lýsa komandi fundir.

Tá nýggja bygdaráðið í Mikladali hevði fyrsta fund sín, tók tað nógv umrøddu avgerðina um, at skúlin á Trøllanesi ikki skuldi takast í brúk aftur, soleiðis sum undanfarna bygdaráð hevði samtykt.

## Lóglig avgerð

Anfinn Kallsberg sigur í svari sínum, at áðrenn nýggja bygdaráðið tekur við í nýggja árinum, kann tað bara viðgera mál, sum hava við val av formanni og líknandi at gera. Tá kunnu veruligar avgerðir ikki takast.

Men tá bygdaráðið hevur tikið við og hevur fyrsta vanliga fundin, hevur bygdaráðið heimild til at taka allar viðkomandi avgerðir um mál í kommununi.

Tulkingin hjá løgmanni er tí, at fyrsti fundurin hjá nýggjum bygdaráði er at sammeta við allar aðrar fundir, og tí kann slík avgerð, sum tann um skúlan á Trøllanesi, takast á hesum fyrsta fundi. Tað er eingin treyt, at bygdaráðið bara skipar seg á hesum fundi og lýsir komandi fundir.

– Fundurin 9. januar má sostatt javnmetast við aðrar vanligar fundir, soleiðis at skilja, at kommunustýrið kundi viðgera øll mál, har kommunustýrið annars er málsførur myndugleiki, sigur løgmaður í svarinum til Vilhelm Johannesen.

## Vantandi kunning eingin forðing

Norðoyatingmaðurin spurdi eisini Anfinn Kallsberg, um løgmaður kann ógilda avgerðir, sum stríða ímóti eini ávísari grein í kommunulógini, sum millum annað snýr seg um lýsing av fundum hjá einum bygdaráði.

Orsøkin til hendan spurning er, at fyrsti fundurin hjá Mikladals bygdaráðið, sum varð hildin 9. január í ár, ikki varð lýstur, soleiðis sum hann átti at verða. Og tað var á hesum fundi, at avgerðin um skúlan á Trøllanesi varð tikin. Sjálv avgerðin var haldur ikki fráboðað, sum hon skuldi verið.

Løgmaður sigur í sínum svari, at eitt kommunustýrið skal halda lógina og lýsa, nær fundir verða hildnir. Eisini skulu avgerðir verða almennar. Men hóast bygdaráðið ikki fylgir lógini og lýsir fundin á rætta hátt, so er fundurin lógligur fyri tað, sigur løgmaður.

– Løgmansskrivstovan er av teirri fatan, at um kommunustýrið er viðtøkuført, verður fundurin ikki ólógligur orsaka av, at hann ikki er almannakunngjørdur sum partur av ársfundarætlanini, ikki er lýstur ítøkiliga ella um um yvirlit yvir mál, ið koma fyri á fundinum, ikki er lýst frammanundan, sigur Anfinn Kallsberg.

– Ein tikin avgerð, har kommunustýrið annars er rættur myndugleiki, eigur tí í útgangsstøðinum ikki at verða ógildað, hóast reglurnar um kunning av borgarunum ikki eru fylgdar.

## Broytir einki

Um eitt kommunustýrið ikki lýsir ein fund á rættan hátt, so skal tað fáa hesi viðurskifti í rættlag. Løgmans-skrivstovan hevur møguleikan at áleggja dagbøtur til hesi viðurskifti eru fingin í rættlag, men avgerðir, sum eru tiknar á fundum, sum ikki eru lýstir, verða ikki broyttar.

Harvið staðfestir løgmaður, at hann ætlar sær einki at gera við tiltiknu avgerðina hjá Mikladals bygdaráð 9. január, tá skúlin á Trøllanesi varð stongdur, áðrenn hann var latin upp.

At borgarar í kommununi ikki fingu almenn boð um hesa avgerð fyrr enn fleiri mánaðir aftaná, er heldur ikki ein orsøk til at strika hesa avgerð.

Anfinn Kallsberg sigur eisini í svari sínum til Vilhelm Johannesen, at avgerðin um at niðurleggja skúlan var tikin í tráð við galdandi lóggávu, soleiðis sum Mentamálastýrið eisini hevur sagt.

Hóast Mikladals bygdaráð tók avgerðina um at lata skúlan á Trøllanesi aftur á fyrsta fundi sínum, og hesin fundurin ikki var lýstur sum hann skuldi verið og avgerðin heldur ikki, so var avgerðin lóglig, og løgmaður fer einki stig at taka fyri at strika hesa avgerð.



*Anfinn Kallsberg heldur ikki, at nøkur orsøk er til at strika avgerðina hjá Mikladals bygdaráð viðvíkjandi skúlanum á Trøllanesi*

# Jólakonsert í Ósáskúlanum

**Hóskvøldið verður jólakonsert í Klaksvík, og millum tey sum syngja er nýtt skúlakór**

KONSERT
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Hóskvøldið klokkan 19.00 verður jólakonsert í skúlanum við Ósánna.

Tey, sum fara at syngja, eru Skúlakórið, 17 sangarar, næmingar á nýggja sangskúlanum í Klaksvík, og næmingar úr Klaksvíkar Tónlistaskúla fara at spæla.

Skúlakórið í Klaksvík er nýtt. Fyrstu venjingarnar vóru í heyst, og ætlanin er nú at fáa hetta kór í fasta legu. Í løtuni eru tað bara gentur, sum syngja í kórinum. Tað eru tey trý Steinvør Fonn, Tóra við Keldu og Hans Michael Christiansen, sum taka sær av kórinum.

17 sangarar er kór, sum hevur fleiri ár og eina fløguútgávu aftanfyri seg. Tey fara at syngja nakrar jólasangir hóskvøldið.

Næmingar á nýggja sangskúlanum í Klaksvík fara at syngja sum kór - bæði fyri seg og saman við 17 sangarum.

Harafturat fara nakrir næmingar av Klaksvíkar Tónlistaskúla eisini at spæla.

Tað er avmarkað atgongd til jólakonsertina, og tí verða atgongumerki seld í forsølu á Norðoya Kunningarstovu.

Tað sleppa bert hundrað fólk inn til konsertina, og um tað vísir seg, at áhugin fyri konsertini er stórur, og øll atgongumerkini verða seld mikudagin, so er møguleiki fyri, at eykakonsert verður hildin seinni hóskvøldið.